# MILLUM VÆLSIGNILSI OG FORBANNILSI

ER LÍVIÐ EITT **VÆLSIGNILSI?** ELLA EITT **FORBANNILSI?** ELLA EITT SINDUR AV HVØRJUM? **JÓANES NIELSEN** ER Í HORNATØKUM VIÐ SJÁLVAN EKSISTENSIN Í ØLLUM SÍNUM GRIMLEIKA Í MEISTARALIGA LEIKINUM »**AFTAN Á UNDRIÐ**«, SUM TJÓÐPALLUR FØROYA Í HESUM DØGUM FRAMFØRIR Á MEIARÍNUM.



**UMMÆLI**
**Heini í Skorini**
heini_skorini@yahoo.com

Lítla trædukkan Pinocchio gjørdist menniskja. Og so endaði søgan.

Men tað er tá, at søgan veruliga byrjar. Tað er í hurðagapinum inn til lívið, at søgan hjá okkum mannabørnum fer í gongd. Uttan mun til, um vit hava hug til ferðina ella ikki, so er eingin vegur uttanum. Uttan sjálvmorðið, sjálvandi.

Hetta fær Pinocchio at vita í eini samtalu við tann grima Heggen prest tíðliga í leikinum:

»Menniskjan stendur á gáttini til lívið, og (...) tað ber ikki til at bakka. Tað finst bara ein gongd leið«.

»Hvør er hon?«, spyr tann forvitni Pinocchio.

»Tað er tín egna leið«, teskar Heggen prestur.



MYND: FINNUR JUSTINUSSEN

*Kristina Sørensen Ougaard í høvuðsleiklutinum sum smádrongurin Dávid við heilasvulli, sum flýggjar inn í heimin hjá trædukkuni Pinocchio.*

### Stórfingið

Jóanes Nielsen er í hornatøkum við stórar og svárar spurningar í nýggja leikinum hjá Tjóðpalli Føroya, »Aftan á undrið«, sum í hesum døgum verður framførdur á Meiarínum í Havn. Og lat tað vera sagt beinanvegin, at talan er um eitt meistaraverk. Eitt dramaturgiskt, visuelt, tónlistarligt og eksistentielt meistaraverk, sum staðfestir, hví leiklistin er ein so sterk listagrein, tá hon riggar.

Bøkur hava orðini, sum eru festar á blað. Tónleikurin hevur ljóðið, sum kemur frá ljóðførunum. Men sjónleikurin hevur orð, ljóð og kroppar. Og »Aftan á undrið« er av sonnum ein sansamettandi uppliving. Ein estetiskur rúsur. Ein eksplosión av leikarum, tónleiki, sangi, ljósi og dreymakend-um pallmyndum. Ein tann største uppsetingin hjá Tjóðpallinum nakrantíð.

Og lat tað eisini vera sagt, at tað er við eyðmjúkum og bivandi hjarta, at undirritaði, sum ikki hevur leiklistarliga útbúgving, skrivar hesar reglur. Tí »Aftan á undrið« er eitt multidimensionelt listaverk, sum hevur uppiborið at verða viðgjørt á fleiri stigum og í sama klassa, sum leikurin sjálvur er í. Hesar reglur skulu tí ikki lesast sum ein fullgjørd meting, men sum eitt ískoyti, sum vónandi kann seta orð á okkurt av tí intensu uppliving, sum Tjóðpallur Føroya, ein føroyskur rithøvundur, ein íslendskur leikstjóri, átta heilhjartaðir leikarar, ein frálíkur tónasmiður pluss øll hini kring leikin í hesum døgum borðreiða við.

### Deyðin

Tað er trupult og stundum ørkymlandi at hyggja at leikinum. Mørkini millum veruleika og hugflog eru kám. Og mørkini millum fortíð og nútíð eru heldur ikki týðilig. Høvuðspersónurin Dávid, ein 12-13 ára gamal smádrongur við heilasvulli, blandar konstant dreym og veruleika, tá hann flýggjar inn í ævintýrheimin hjá Pinocchio og blandar element frá sínum egna veruleika við verðina hjá italska rithøvundanum Carlo Collodi, sum í 1880'unum skrivaði søguna um trædukkuna, sum bleiv livandi. Søgan flytur seg ímillum ein ítøkiligan og ein mytologiskan heim, og symbolikkurin, surrealisman og stundum eisini absurditeturin geva tí ítøkiligu tulkingini av søgugongdini konstant mótspæl. Tað er tíðum frustrerandi, men tað er samstundis ein intellektuell avbjóðing, tí upplivingin skal sodna, búnast og fáa skap í hugaheiminum hjá áskoðarunum rúma tíð eftir, at leikurin er liðugur. Søgan rúmar við øðrum orðum eina dýpd, sum allarhelst skilir vøtnini, tá móttakarin skal gera seg klókan uppá, hvat Jóanes Nielsen í grundini vil kommunikera.

Á tí ítøkiliga støðinum hevur tematikkurin eisini eina breidd. Sjónleikurin snýr seg um eitt forfjónað barn við einum høgum deyðsmedviti. Um hjúnabandskreppur. Um konubuking. Prostitutión. Alkoholismu. Ótrúskap. Sjúku. Deyðsótta. Deyðslongsul. Religión. Og óivað mangt, mangt annað.

Men sum eg sat í myrkrinum á lítla Meiarínum, fekk tann reyði tráðurin rættiliga skjótt eitt eksistentielt skap. Tað snýr seg um spenningin ímillum lív og deyða. Pinocchio-dukkan hjá smádronginum Dávidi spyr tíðliga í leikinum, um tað er vandamikið at doyggja. Og tá Dávid er flýggjaður inn í dreymaverð, bedýrar hann fyri svørtu kaninunum, at hann í øllum førum ikki ætlar sær at doyggja. Men kaninirnar svara, at man má liva, áðrenn man doyr. At tað hevur týdning at venja seg til at doyggja. Og at tann lítli og sjúki Dávid, sum í sínum dreymum er ein frískur Pinocchio, longu er eitt sindur deyður.

### Lívið

Niðurteljingin byrjar í móðurlívi. Tímaglasið rennur frá fyrsta sekundi. Og spurningurin er so, hvussu vit menniskju liva okkara lív við deyðanum sum